**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1632**
**Tíðarskeið: 17/8 - 27/8 2016**

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Marit Pedersen, Luis R. Cruz, Mourits M. Joensen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Somu upplýsingar skuldu eisini fáast til vega av longu og brosmu. Av svartkjafti skuldu fyri báðar túrarnar tilsamans takast 150 nytrur av smáttfallandi fiski. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Magakanningar skuldu eisini gerast, serliga av toski, hýsu og upsa. Aðrir lívfrøðiligir prøvar kundu takast - hesum verður toktleiðarin at skipa fyri.

**Reiðskapur og útgerð:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Vanligur grunnur. Mini-loggarar.




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á sumri við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 200 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Hetta er 21. árið, har gjørdir verða tveir túrar á 2 vikur á sumri og við 200 trolstøðum íalt. Støðirnar liggja spjaddar kring allan Landgrunnin, og tóvað verður í 1 tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári (Mynd 1). Arbeitt verður alt samdøgrið. 110 trolstøðir vórðu tiknar á fyrra túrinum, so 90 trolstøðir vóru eftir at taka á hesum túrinum.
Farið varð av Havnini tann 18/8 kl. $21^{05}$, og kastað varð fyrstu ferð á Munkagrunninum 19/8 kl. $02^{21}$ (øki IX, puntur 11). 22/8 kl. $03^{00}$ varð farið á Havnina at skifta stýriborðsblokkin, sum bleiv í ólagi næstan beinanvegin á túrinum. Flótitrolsblokkurin varð nýttur nøkur hál, men neyðugt var at fara inn at skifta tann vanliga blokkin. Samstundis varð veiðan landað. Kl. 15 var umvælingin liðug, og so varð farið av Havnini aftur til framhaldandi kanningar. 25/8 var Magnus Heinason á Miðvági, tí ein av manningini skuldi til lækna; farið varð útaftur beinanvegin. Tann 27/8 kl. $22^{30}$ var síðsta støðin á túrinum tikin, og so varð hildið á Havnina, har vit komu 28/8 kl. $01^{00}$, og túrur nr. 1632 var hervið at enda komin.
Túrurin gekst væl, og tað viðraði avbera væl. Tilsamans vórðu gjørd 94 hál; fýra av teimum vórðu ikki góðkend, men tað eydnaðist so at taka allar 90 støðirnar. Eitt yvirlit yvir allar støðir á yvirlitstrolingunum á sumri er í túrætlanini fyri hendan túrin (1632) og á Mynd 1.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum sæst í talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð sum vant eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar tiknir av tí nytraða fiskinum. Umframt tey í talvu 1 nevndu sløg, so vórðu makrelar frystir til nærri kanningar í landi.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin er rættaður og lagdur í basu, og miðað verður eftir, at allir aldrar eru lisnir í november.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Í talvu 1 er eitt yvirlit yvir øll sløgini, ið vórðu fingin á hesum túrinum, hvussu nógv varð fingið av hvørjum slagi, og hvussu nógvir nytru- og magaprøvar vórðu tiknir. 41 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt ymisk sløg av t.d. høgguslokki, skel, krabbadýrum og ymiskum øðrum, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót. Mest varð fingið av upsa, og síðani komu toskur, hýsa, gulllaksur, svartkjaftur, lítli kongafiskur, hvítingsbróðir, longa og stóri kongafiskur. Fiskurin sum heild var um miðal í holdum, og á flestu leiðum hevði hann nóg mikið at eta.
Á mynd 2 eru fyribils úrslit fyri nøgd (veiða í kg pr. støð) fyri úrvald fiskasløg. Í stuttum kann sigast fyri báðar túrar tilsamans, at nøgdin av toski í ár og í fjør hevur verið nakað størri enn tey 3 árini fyri, men hesi úrslit skulu takast við ávísum fyrivarni, tí fyri bæði ár stavar meginparturin av vøkstrinum frá eini og somu støð vestan fyri Skúvoynna. Fyri hýsu hevur sera lítið verið at fingið í nógv ár, og í 2015 og 2016 var myndin tann sama hóast eitt vet betri enn árini frammanundan; her eru tó glottar at hóma, tí tað eru týðiligar ábendingar um, at 2015-árgangurin er góður, og kanska er 2016-árgangurin eisini á eini leið. Fyri upsa er at siga, at slíkar yvirlitskanningar ikki eru so eftirfarandi, men fyribils sær út til, at nakað meira er til enn seinastu fáu árini, serliga av smátfallandi fiski. Annars er vert at nevna, at tað bragdaði veruliga fyri stóra kongafisk; hetta hevur verið væntandi í fleiri ár, tí stovnsmetingar av stóra kongafiski, ið vit hava felags við Ísland og Eysturgrønland, hava í fleiri ár víst, at hesin stovnur er hampuliga væl fyri. Sama kann sigast um longu, brosmu og reyðsprøku. Fyri hvítingsbróður hevur veiðan yvirhøvur verið í minking í fleiri ár, og í 2016 helt hendan gongdin fram. Her skal verða mint á, at talið á fiski er ikki lítið, og serliga er talið á yngli hampuliga stórt í ár. Svartkjaftur hevur verið í vøkstri í fleiri ár, og gongdin stendur við. Við støði í hesum kanningunum tykist gulllaksur eisini at vera hampuliga væl fyri. Hinvegin eru tunga og serliga trantkongafiskur og kalvi illa fyri.

Fyri uppsjóvar-stovnarnar sild, makrel og rossamakrel eru slíkar kanningar við einum lítlum botnfiskatroli ikki so væl hóskandi til at meta um, hvussu nógv er til. Men makrelur er eftir hesum at døma væl fyri, og er hetta í samsvari við aðrar størri kanningar; sild (heystgýtandi) er í vøkstri, meðan lítið varð fingið av rossamakreli.

Havstovan, 9. september 2016

*Jákup Reinert*

**Talva 1. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar pr. slag á túri 1632, 90 støðir íalt.**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Nytrur, tal | Magar, tal |
|---|---|---|---|
| Upsi | 11964.768 | 426 | 98 |
| Toskur | 9309.825 | 592 | 95 |
| Hýsa | 7145.097 | 528 | 86 |
| Gullaksur | 6107.750 | | |
| Svartkjaftur | 3732.013 | | |
| Lítli kongafiskur | 2941.565 | | |
| Hvítingsbróðir | 1748.431 | | |
| Longa | 1286.923 | 76 | 4 |
| Stóri kongafiskur | 1271.087 | | |
| Makrelur | 1021.404 | | |
| Havmús | 1012.045 | | |
| Hvalspýggj | 485.863 | | |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 439.033 | | |
| Hvítingur | 427.185 | | |
| Reyðsprøka | 412.972 | | |
| Havtaska | 350.558 | | |
| Trantkongafiskur | 287.511 | | |
| Skrambul | 224.506 | | |
| Tunga | 217.185 | | |
| Brosma | 202.904 | 26 | 7 |
| Blálonga | 177.120 | 26 | 3 |
| Sandsprøka | 102.390 | | |
| Silvurmurtur | 80.169 | | |
| Knurrhani | 72.409 | | |
| Glaskvoysa | 65.578 | | |
| Gamal fiskur | 52.085 | | |
| Lítlabrosma | 37.486 | | |
| Tindaskøta | 33.824 | | |
| Sild | 33.260 | | |
| Rossamakrelur | 28.954 | | |
| Hvassasprek | 27.422 | | |
| Skøta | 23.355 | | |
| Rognkelsi | 20.440 | | |
| Lálla | 19.852 | | |
| Steinbítur | 19.559 | | |
| Purpurigulker | 17.738 | | |
| Búksvarti hávur | 17.041 | | |
| Lýrur | 16.242 | | |
| Igulgker | 11.560 | | |
| Grunnmús | 10.800 | | |
| Cnidaria | 6.515 | | |
| Kjaftsvarti hávur | 5.903 | | |
| Øða | 5.759 | | |
| Alcyonum | 4.914 | | |
| Mathøgguslokkur | 4.092 | | |
| Geodia sp. | 3.786 | | |
| Agngágga (deyð) | 1.993 | | |
| Liri | 1.840 | | |
| Asteriidae | 1.579 | | |
| Skaddur fiskur | 1.410 | | |
| Eledone | 1.283 | | |
| Kalvi | 1.133 | | |
| Phakellia sp. | 0.993 | | |
| Agnhøgguslokkur | 0.818 | | |
| Hummari | 0.637 | | |
| Rækja | 0.528 | | |
| Glæmufiskur | 0.496 | | |
| Jákupsskel | 0.291 | | |
| Mjái prikkafiskur | 0.177 | | |
| Bláriddari | 0.148 | | |
| Murrikrutt | 0.074 | | |
| Øða (deyð) | 0.072 | | |
| Solasteriidae | 0.048 | | |




**Mynd 2**. Fyribils úrslit (veiða pr. støð, kg) frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1999 fyri úrvald fiskasløg.




**Mynd 2 (framhald)**. Fyribils úrslit (veiða pr. støð, kg) frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1996 fyri úrvald fiskasløg.